# Kári skal stríðast fyri javnstøðu

**– Eg eri uppvaksin millum sterkar kvinnur, og eg haldi, at tað er stórt spell, at kvinnur skulu grava sínar talentir niður orsaka av fordómum. Øll skulu hava møguleikan at brúka síni evni, sigur Kári á Rógvi, nýggjur formaður í Javnstøðunevndini**

JAVNSTØÐA
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*



*– Tað er einki í andsøgn við siðbundnað mentan, at kvinnur kunnu brúka sínar talentir. Tað er upp til hvønn einstakan, hvussu tey skipa seg í heiminum, men á arbeiðsmarknaðinum skulu kvinnur hava somu møguleikar sum menn, sigur Kári á Rógvi*

Ein 32 ára gamal maður skal nú standa á odda fyri javnstøðuarbeiðnum í Føroyum.

Tað gjørdist greitt, tá ið Almanna- og Heilsumálaráðið týsmorgunin setti Kára á Rógvi í tøka sessin sum formann fyri Javnstøðunevndina.

– Eg varð biðin, og eg havi tikið av. Tað er púra natúrligt, at formansessurin í Javnstøðunevndini onkuntíð er hjá einum manni og onkuntíð hjá einari kvinnu, sigur Kári á Rógvi.

Løgfrøðingurin úr Havn hevur seinni árini verið virkin í ymsum nevndararbeiðið í Føroyum, og hann hevur eisini luttikið nógv í almenna kjakinum – millum annað í Tinghelluni her í Sosialinum.

Kári á Rógvu er cand. jur, hann hevur tikið Master of Laws í Aberdeen, og nú skrivar hann phd-ritgerð í Íslandi um stjórnarrætt. Áður hevur hann verið skrivari í grundlógarnevndini, formaður fyri Føroya Óaðalsfelag, og nú er hann næstformaður í stjórnarskipanarnevndini.

## Millum sterkar kvinnur

Hevur tú ein natúrligan áhuga fyri javnstøðuarbeiði ella sært tú hetta sum eina professionella avbjóðing?

– Eg fekk áhuga fyri javnstøðu í sambandi við grundlógararbeiðið. Uppgávan í javnstøðunevndini er í tveimum. Annar parturin er at ansa eftir, at tær galdandi reglur verða hildnar – til dømis á arbeiðsmarknaðinum – og tað er ein ítøkilig uppgáva. Hin parturin er av meira idealistiskum slagi við at upplýsa og skapa kjak um javnstøðu, og her havi eg eisini royndir, sigur Kári á Rógvi.

– Eg eri uppvaksin millum sterkar kvinnur. Ommusystrarnar hjá mær í Vestmanna vóru væl útbúnar, og tær vóru vinnulívskvinnur. Eg haldi, at tað er stórt spell, at kvinnur skulu grava sínar talentir niður orsaka av fordómum. Øll skulu hava møguleikan at brúka síni evni.

## Somu møguleikar

Kári á Rógvi sigur, at hann er ikki heitasti fortalarin fyri nummeriskari javnstøðu.

– Tað týdningarmesta er, at øll hava somu møguleikar at brúka síni evni. Menn skulu ikki halda kvinnum aftur, og kvinnur mugu eisini grípa í egnan barm og ikki halda sær sjálvum aftur. Vit hava nógvar dugnaligar og væl útbúnar kvinnur, men tað eru summar kvinnur, sum halda sær sjálvum aftur. Tað hava tær onga orsøk til.

– Tað er einki í andsøgn við siðbundnað mentan, at kvinnur kunnu brúka sínar talentir. Tað er upp til hvønn einstakan, hvussu tey skipa seg í heiminum, men á arbeiðsmarknaðinum skulu kvinnur hava somu møguleikar sum menn, sigur Kári á Rógvi.

Hann hevur tryggjað sær, at tað verður settur ein skrivari fyri javnstøðunevndina, sum kann taka sær av tí dagliga arbeiðnum, meðan hann saman við nevndini skal taka avgerðir, vera við í kjaki og seta út í kortið.

Og væntar tú tær okkurt skotið, nú tú ert blivin formaður fyri Javnstøðunevndina?

– Ja, mann ikki tað. Kanska Óli P. fer at tekna meg í brósthaldarum...

# Fyrireikararnir púra paff av undirtøkuni

**Fyrireikararnir av Sjómannadegnum í Klaksvík eru ovfarnir av, at undirtøkan fyri degnum gjørdist so stór. Sjómannadagurin verður endurtikin í august mánaði næsta ár**

SJÓMANNADAGUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

Ein ørgrynna av fólki var til Sjómannadagin í Klaksvík leygardagin. Fyrireikararnir rokna við, at millum 2 og 3.000 fólk vóru á Stongunum leygardagin, og longu frá morgunstundini var fult av fólki til tiltakið.

– Vit eru púra paff av, at so nógv fólk komu til tiltakið. Vit høvdu ikki droymt um, at tað fóru at koma so nógv fólk, sigur Oliver Joensen, sum er ein av fyrireikarunum av Sjómannadegnum.

Hann staðfestir, at Sjómannadagurin er komin fyri at vera.

– Sjómannadagurin skal vera eitt alternativ til onnur stór tiltøk í Norðoyggjum, dagurin skal í størsta mun verða ókeypis, og næsta ár ætla vit, at tiltakið skal vera enn størri, sigur Oliver Joensen.

## Varandi framsýning

Hann heldur, at tiltøkini á Sjómannadegnum riggaðu sær væl, og at onkur av teimum kundu blivið verandi í býnum.

– Framsýningin av livandi fiski, krabbum, hummarum og øðrum kundi saktans verið permanent. Klaksvík skuldi havt eitt akvarium av onkrum slagi, so at børn og vaksin alt árið kundu sæð livandi fisk og spælt við krabbar.

– Tað skal ikki vera tað almenna, sum skal standa fyri einum slíkum akvarium, tí so verður tað alt ov dýrt, men heldur skuldu onkur feløg, fiskimenn ella privatpersónar tikið sær av tí, sigur Oliver Joensen.

Enn er dagfesting ikki sett á Sjómannadagin í 2006, men tað verður gjørt sum skjótast. Fyrst skal finnast fram til, nær streymurin er harðast, og so verður dagurin lagdur tann leygardagin, sum helst verður í august.



*Kelving á Sjómannadegnum. Góða veðrið og nógvu stuttligu tiltøkini gjørdu dagin áhugaverdan hjá nógvum fólki*